LANDSGRANNSKOÐANIN

# Brot

# úr

# stýrisskipanarlógini

(løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya)

## um

# grannskoðan

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo

# Brot úr: Ll. nr. 103/1994 um Stýrisskipan Føroya

**§ 45.** Landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok.

*Stk. 2.* Løgtingið velur nakrar grannskoðarar. Teir fara ígjøgnum árliga landskassasroknskapin og ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Teir kunnu krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørvar. Greiniligari reglur um, hvussu mangir grannskoðarar skulu vera, og um virki teirra, verða ásettar í løgtingslóg.

*Stk. 3.* Landskassaroknskapurin við viðmerkingum grannskoðaranna verður lagdur fyri løgtingið til samtyktar.

*Stk. 4.* Reglurnar í stk. 1-3 verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.